# Settu Futt í Býin beinanvegin



## Tónleikur

**Rógvi Nybo**
blaðmaður
rogvi@sosialurin.fo

Ólavsøkukonsertin, sum vit kendu hana, hevði skift bæði ham, tíðspunkt og stað á hesi ólavsøkuni. Í mun til undanfarin ár, tá ólavsøkukonsertin hevur verið hildin 27. juli í kommunuskúlagarðinum, varð hon í ár hildin tann 25. juli í Tórsgøtu. Afturat tí varð í ár talan um tveir ymiskar pallar, har konsertirnar vóru hildnar upp á skift. Harafturat hevur ólavsøkukonsertin nú broytt navn, soleiðs at hon nú eitur Futt í Býin.

Her eru myndir frá fleiri av teimum ymisku tiltøkunum, sum vóru í samband við Futt í Býin.

*Myndir: ©mureldur*



*Ongum at siga spældu 200 sera hart, kanska ov hart fyri summi*



*Bjarni Lisberg var gestaklaverleikari hjá Brandi Enni*



*Inni á Tjóðpallinum varð ljós- og ljóðspælið sera gott*